


Sára vann stóra vinningin

Týskvøldið í farnu viku vann 14 ára gamla Sára Óladóttir Arge stóra vinningin í »6 í rútara«. Hon var tann fyrsta nakrantíð at vinna stóra vinningin í nýggja spælinum hjá SvF

JOHN JOHANNESSEN

Pengarnir fara til eitt árs uppihald í USA. Tað hevur 14 ára gamlæa Sára Óladóttir Arge longu avgjørt. Hon gongur í løtuni í áttanda flokki, men tá hon er liðug við níggjunda flokk, ætlar hon sær til USA at ganga í skúla sum AFS næmingur.

Frá SvF greiða tey frá, at Sólva gjørdist ovurfegin, tá hon vann stóra vinningin á 50.000 krónur. Tey fegnast eisini um, at tað vare Sólvá, ið vann tann stóra vinningin, og halda tey, at avgerðin um at nýta pengarnar til skúlagongd í USA er sera skilagóð.

Væl Nøgd við spælið

Gunhild á Rógvu Olsen, marknaðarleiðari í SvF, er væl nøgd við nýggja spælið, og hon sigur seg eisini vera væl nøgda við undirtøkuna fyri tí.

– Talan er um eitt nýtt spæl og eitt nýtt spælikvøld, og tískil skulu fólk eisini venjast við at spæla, men tað haldi eg gongst væl. Undirtøkan økist alsamt.

Gunhild seg halda fólk fuga sera væl at gita, hvørjir persónar fjala seg aftanfyri kortini á sjónvarpsskýggjanum, og sigur hon seg hava hoyrt frá fleiri, at tey halda tað vera stak hugnaligt at sita og gita saman um kvøldarnar. Tí hevur Gunhild góðar vónir fyri sendingini. Hon kann tó ikki siga, hvussu nógv hon fer at geva av sær. Hetta veit hon ikki fyrr enn árið er liðið.

»6 í rútara« skal broytast eitt sindur. Sum er sleppa 18 fólk framat at gita, og hetta halda tey í SvF ger sendingina ov drúgva. Tískil skal sendingin broytast, so bert 12 sleppa framat. Hetta, halda tey, fer at gera sendingina áhugaverdari, og hava tey allatíðina ætlað hetta. Men tey valdu at lata 18 sleppa framat í fyrstuni, fyri at venja fólk at spæla.

Ting

Nú verður tosað um, at nýtt løgtingshús skal gerast. Tað kunnu áskoðaninar vera ymiskar um, men eitt er vist: Teir sum tosa um at gera eitt løgtingshús, kunnu ikki hava nógv álit á, at vit um minni enn eitt ár búgva í einum fullvalda ríki.

Ting okkara hevur nevnliga ikki altíð itið løgting.

Elsta søguliga kelda, sum vit hava um hetta, er, at tá føroyingar gingu undir landslógina hjá Magnusi Hákunssyni í 13. øld, verður sagt, at hetta hava føroyingar samtykt á altingi.

Gamla navnið fyri ting okkara hevur tí verið alting. Hetta er tað navn, sum landnámsmenninir hava nýtt um høvuðstingið í Havn, og merkir tað, at hetta ting hevur havt hægsta vald.

So í 13. øld kom norska landslógin, sum segði, at undir kongsins valdi vóru nøkur ting við avmarkaðum myndugleika, sum itu løgting. Eitt av hesum var í Føroyum.

Nú sleppa vit okkum úr tí oki, sum higartil hevur ligið á okkum og gerast eitt fullvalda ríki. Nú er tí hóskiligt, at vit eisini leggja aftur um okkum ta niðring av okkara tingi, sum liggur í tí navni, sum harrar okkara settu á tað, og aftur geva tí tað glæsiliga navn, sum okkara frælsu forfedrar góvu tí.

Zakarias Wang

nøvn nú nøvn nú

Heilsanir




Hey Eyðhild
Hjartaliga tillukku við degnum. Ja, nú er nógv broytt. »Velkommen i den grønne lund«
Heilsan tann grøni




Góða Eyðhild
Hjartaliga tillukku við degnum. Takk fyir nógvar góðar løtur bæði við spæli og álvara, við vón um fleiri.
Heilsan ein vinur



5 ættarlið
Frá vinstru mamman Bjørg Tausen 20 ár, omman Marina Tausen 38 ár, langomman Eyðbjørg Jacobsen 62 ár, olduromman Martina Jensen 87 ár og lítla Mona Tausen Natteröy 8 mðr.



Góða Súsanna
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum ið var 10. okt. Deilig frisura heldur tú ikki tað? Hvat manst tú hugsa um? Hævnen er sød.
Heilsan E.J.



Góðu Súsanna og Sigurð
Hjartaliga tillukku við 25 og 21 ára døgunum tann 11. okt.
Ynskir lítladiddi



Góða Malfrið
Hjartaliga tillukku við 20 ára føðingardegnum. Jesus signi framtíð tína.
Ynskir Babba

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** **25,- kr.**

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Friggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:

.....

.....

.....

.....

.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**